Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Frimodt Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Søla av vørum ímillum almennar stovnar

Spurningar:

1. Er nøkur kanning gjørd av, hvussu felagsgoymslan á Landssjúkrahúsinum setur prísirnar á vøru til sjúkrahúsini?
2. Um so er at kanning er gjørd, hvat sigur hon so um prísásetingina á vørurnar?
3. Selur felagsgoymslan undir Landssjúkrahúsinum vørur til aðrar almennar stovnar?
4. Um ja, hvørjir eru hesir stovnar, og hvussu verða prísirnir ásettir?

Viðmerkingar:

Løgtingið játtar á hvørjum ári pengar til tær ymisku konturnar á fíggjarlógini, og sigur harvið hvar, pengarnir skulu verða brúktir.

Mær vitandi, so hevur Sjúkrahúsverkið gjørt av at hava felags innkeyp, sum felagsgoymslan undir Landssjúkrahúsinum stendur fyri. Tað er skilagott at hava felags innkeyp, tá ið hetta kann hava eina jaliga ávirkan á innkeypsprísin.

Men um so er, at prísásetanin á vørurnar til aðrar partar í Sjúkrahúsverkinum verður sett ov høgt, verður vinningurin størri hjá tí, sum selur. Á henda hátt vera pengarnir fluttir frá teimum kontum, Løgtingið hevur avgjørt, at teir skulu brúkast, til felagsgoymsluna undir Landssjúkrahúsinum, sum stendur fyri innkeypinum.

Um so er, at aðrir almennir stovnar keypa vørur frá felagsgoymsluni á Landssjúkrahúsinum, so ger tað sama seg galdandi viðvíkjandi Løgtingsins vilja.

Um so er at prísurin, ið verður ásettur ímillum partarnar, ikki fremur ætlanina við at hava felags innkeyp, skuldi hvør partur havt møguleikan at keypt inn, har bíligast var.

Á hendan hátt fæst best burtur úr á øllum kontum, ið Løgtingið hevur ásett, og pengarnir verða ikki fluttir frá einum almennum stovni til annan, uttan Løgtingsins vilja.

Á Løgtingi, 2. desember 2021

Frimodt Rasmussen